# BÝRÁÐSFUNDUR

# Vágs Býráð

**Dagfesting:** 19.03.2018 kl. 19:00
**Málnr.:** 17/00001

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Kirstin Strøm Bech
Levi Mørk
Anna Brattaberg Samuelsen
Eyðbritt Krosslá
Dánjal Bjarkhamar

Vara limir: Jens Sivar Djurhuus
Meinhard Edmund Vestureið

Ikki møtt: Conrad Gaard Joensen, fráboðað
Erhard Joensen, sjúkrameldaður

Nevndarskrivari: Petry Joensen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
| --- | --- | --- | --- |
| **Til viðgerðar** | | | |
| 10/18 | 17/00157-2 | KT politikkur | 3 |
| 11/18 | 18/00049-4 | E-Grevstur, umsókn um byggiloyvið bryggjan 9 | 3 |
| 12/18 | 18/00050-2 | Umsókn um byggiloyvið til Ítróttarháskúla/næmingaheim | 5 |
| 13/18 | 18/00026-3 | Leigusáttmáli millum Vágs kommunu og Suðuroyar Heimavirki | 8 |
| 14/18 | 18/00093-2 | Menning í Suðuroy, Smáttur | 8 |
| 15/18 | 18/00079-1 | Sundurbýti av 596a - øki undir Marghøllini | 8 |

Erhard er framhaldandi sjúkrameldaður og Conrad hevur boða frá, at hann ikki kann møta í kvøld og ynskir at eykalimur kemur inn.
Jens Sivar er fyrsti eykamaður og Marin er næst eykamaður, Marin hevur boða frá at tað ikki liggur fyri hjá henni at møta og tí er næsti maður á listanum Meinhard Edmund Vestureið møttir.

Einmælt samtykt at taka undir við Meinhard Edmund Vestureið tekur sætið.

## 10/18 KT politikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2017 | 107/17 | 17/00157-2 |
| 2 Vágs Býráð | 28.08.2017 | 81/17 | 17/00157-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.03.2018 | 13/18 | 17/00157-2 |
| 4 Vágs Býráð | 19.03.2018 | 10/18 | 17/00157-2 |

Verður lagdur fyri Fíggjarnevndina. Tá FN hevur samtykt skal hann beinast í Býráðið. Seinast dagførdur í apríl 2013.

**Fíggjarnevndin 22. august 2017:**
Einmælt samtykt at leggja hetta fyri býráðið.

**Vágs Býráð 28. august 2017:**
Samtykt at útseta málið til næsta fund.

**Fíggjarnevndin 12. marts 2018:**
Eiga at fáa skriva greitt í politikkin at atgongd inn á einstøku eindirnar skal verða í samráð við einstaka persónin. Og hvør hevur atgongd til tær ymisku telduskipanir hjá kommununi (yvirlit).

**Vágs Býráð 19. marts 2018:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

## 11/18 E-Grevstur, umsókn um byggiloyvið bryggjan 9

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 06.03.2018 | 6/18 | 18/00049-4 |
| 2 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 06.03.2018 | 18/18 | 18/00049-4 |
| 3 Vágs Býráð | 19.03.2018 | 11/18 | 18/00049-4 |

Eitt nýtt felag undir stovnan í Vági, sum Sp.f E-Grevstur v/ Niels Jacob Eysturberg, ætlar at keypa bygningin hjá Løðhamar Seafood á havnalagnum -sum í skrivandi stund er ogn hjá Suðuroyar Sparikassa- og brúka bygningin til at hýsa teirra entprenør virksemið. Tvs. goymslurúm, verkstað, sølu av bilum og billutum o.a. hartil hoyrandi. NJE upplýsur at hann hevur fingið samstarv í lag við bilasøluna hjá Wenzel í Tórshavn.

Við umsóknini er ynskið um at:

- Partur av tekjuni verður hækka, og at broytingar verða gjørdar til atkoma/hurðar, soleiðis at stór hurð verður ísett galvin á suðursíðuni, oman ímóti bryggjuni.
- Leiga 200m2 av uttandurað økinum millum bygningin Bryggjan 9, og egningarskúrarnir, á uml. 200m2
- Leiga økið 4 metur vestur frá bygninginum uml. 100m2

**Bygningurin er staðsettur á leigugrund hjá Vágs Kommunu á havna- og vinnuøki D1. Ásetingarnar fyri havna- og vinnuøki samb. byggisamtyktum fyri Vágs Kommunu eru:**

- **D1.** Økið verður avlagt til havnarendamál og til virkir sum hava við havnina at gera. Nevnast kunnu skrivstovu- og handilsvirkir ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu við tilhoyrandi virksemi. Økið framvið Vágsvegi kunnu tó við loyvið frá býráðnum brúkast til bústaðar endamál.
- **D2.** Byggjast kann eftir tørvi: Timburhandlar, handverksverkstøð, entreprenørvirkir, elementvirkir, smiðjur, goymslur, pakkhús, bilverkstaðir, elverk, bingjuplássa og mangt annað.

Tekniska deild vil sostatt gera vart við at:

- Samb. byggisamtyktum fyri Vágs Kommunu er ikki loyvt til virksemið á D1, annað enn virksemið, sum hevur samband við skipaferðslu og fiskivinnu, og metur TD ikki at virksemið hjá Sp./f E-Grevstur kemur undir slíkt heitið.
  - TD skal tó viðmerkja, at tað longu eru vinnur á D1 økinum, sum fáast við virksemið, ið ikki hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu.
  - Ynskir HVN at játta loyvið til hesa umsókn, er neyðugt at geva frávik í byggisamtyktinum og eftirfylgjandi at broyta byggisamtyktina fyri D1 økið.

E-Grevstur ynskir at brúka bygningin/øki til partvís goymslu, bilverkstað og bilasølu, sum kemur undir umhvørvislógina "Løgtingslóg um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008" kap. 5. eru niðanfyri virkir at meta sum serliga dálkandi:

Kap. 5, Virkir fyri motorakfør og onnur flutningstól.

- Bilhús og pláss til koyriamboð í samband við arbeiðstakara- ella bileigarafyritøkur, her uppi í støð (støðlar) hjá bussum. Bjargingarstøðir.
- Fyritøkur og virkir til veitingar ella umvælingar av motorakførum – prutl undantikin – tá hesar fyritøkur ella virki fremja yvirflatuviðgerð við liti ella lakki.

**Til støðutakan hjá Havnanevndini:**

1. Geva frávik frá byggisamtyktinum og geva loyvið til virksemið á havnarlagnum annað enn ásett.
2. Geva loyvið til at hækka og dagføra bygningin bryggjan 7, samb innsendu tekningar.

TD ger vart við, at treytir eiga at verða settar, soleiðis at bilvrak, olja, dekk os.fr. ikki koma at sløðast uttanfyri bygningin. Eisini skulu avmarkingar verða í leigusáttmálanum, um so er, at eigaraskifti fer fram (eisini um partapeningurin verður seldur), at virksemið ikki fær loyvið til at halda áfram uttan nýggja viðgerð í Teknisku Nevnd.

**Havna- og Vinnunevndin 06. marts 2018:**
HVN tilmælir at geva frávik frá byggisamtyktini og loyva umsøkjara til virksemi sambært umsókn. HVN heitur á umsitingina at tryggja, at í leigusáttmála verða sett krøv um umhvørvi.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 06. marts 2018:**
TN tekur einmælt undir við at geva principielt loyvi til umsøkjara at umbyggja bygningin sambært innsendu tekningum.

**Vágs Býráð 19. marts 2018:**
Samtykt við 7 atkvøðum fyri at taka undir við Havna- og Vinnunevndini og Teknisku- og umhvørvisnevndini, Jens Sivar Djurhuus atkvøddi ímóti og Meinhard Edmund Vestureið atkvøddi ikki.

## 12/18 Umsókn um byggiloyvið til Ítróttarháskúla/næmingaheim

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 06.03.2018 | 13/18 | 18/00050-2 |
| 2 Vágs Býráð | 19.03.2018 | 12/18 | 18/00050-2 |

Vágs Kommuna hevur frá SP/F Kontrast, Magnusheinasonargøta 23, Tórshavn móttikið umsókn um byggiloyvið -vegna Bústaðir, Yvri við Strond 6, Tórshavn- til bygging av ítróttarháskúla/næmingabústaði á matr. nr. 622a í Vági, sum samb. nýggi byggisamtykt, fyri Vágs kommunu (mál 13/00188-51), ið var samtykt á býráðsfundi 25.04.2016, og sum í skrivandi stund liggur til endaligu góðkenningar hjá Innlendismálaráðnum, verður matr. nr. 622a broytt frá friða øki til bústaðarøki B1.

Talan er um ein bygning í tveimum hæddum, við 24 kømrum, felagsøkjum, lestrarrúmum, køki og skrivstovu. Sí viðhefta skjal við nærri lýsing "Umsókn um byggiloyvi_ítróttarháskúli í vági.pdf"

Tekniska deild ger vart við, at í skrivandi stund -12.02.2008-, er samb. Tinglýsing eigarin av matr. nr 622a, Aleksander Nordenskjold Vilhelm. TD er tó vitandi um, at ein tilgongd er byrja at broyta eigara viðurskiftini av matr. nr 622a (mál 18/00005), har nýggi eigarin verður: "Bústaðir, Yvri við Strond 6, Tórshavn"

| **Áseting fyri B 1 – B10 í nýggi byggisamtyktini fýri Vágs Kommunu:** | ***Viðmerking hjá TD:*** |
|---|---|
| Loyvt er einans at byggja sethús við í mesta lagi tveimum íbúðum og eftir serloyvi frá byggivaldinum tví-, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski hvørt. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta hølir til handlar og onnur smærri vinnuendamál, treytað av at hesi virkir ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum sum sethúsabýlingur. | *Ongar ásetingar eru í byggisamtyktinum, ið beinleiðis nevna næmingabústaðir. TD er av tí fatan, at heitið næmingabústaðir hava nokk ikki verði innhugsaðir í byggisamtyktina, orsakað av, at her er talan er um ókent/óvanligt bústaðarheitið. TD metur, at nærmasta líknandi bústaðarheitið, ið kann samanberast við næmingabústaðir, má verða eldrabústaðir. Her ásetur byggisamtyktin at, "Við vaksandi tali av eldri, verður væntandi eisini ein vaksandi tørvur á eldra íbúðum og møguliga eisini av eldrasambýlum. Ein uppraðfesting av at nøkta tørvin hjá øllum borgarum í samfelagnum merkir eisini, at ein øktur tørvur verður á at byggja vardar íbúðir, og møguliga eisini av at byggja fleiri vard verkstøð.*<br>*Íbúðirnar eiga sum heild at verða lagdar millum sethús, meðan vard verkstøð kunnu antin leggjast millum sethús ella á øki fyri almennar stovnar".* |
| 4. Húsini mugu einans byggjast í einari hædd við nýttari loftshædd og mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m | *Bygningurin hevur slætta tekju við einari hædd uppá 6.125 metur frá lendi. Á tekjuni verður ásettur er ein veðurveggur, við* |

| | |
|---|---|
| til mønu, mált frá miðaljørildi (í miðal við húsahornini). Kjallaragólvið má ikki leggjast hægri, enn lægsta stað á lendi við húsavegg. | *hægstu hæddini frá lendi uppá 8.388 metrar.*<br><br>*TD metur at talan er um eitt minni frávik, jbr. kap.1, § 9 í Almennu byggisamtyktini, tá talan á byggningshæddini -upp til yvirgrind- verður 6.125 metur. Samlaða hæddin á bygninginum verður lægri enn hægst loyvda ásetta hæddin í byggisamtykt.* |
| **Øki til parkeringspláss**<br>b. Við sethús í fleiri hæddum, ketu- og raðhús, við felags parkeringsplássum, verður avlagt so stórt øki at pláss verður fyri 1,5 bili til hvønn bústað sær.<br>Við hús, ið heilt ella lutvíst verða nýtt til vinnu, skal parkeringspláss til vinnulig endamál í hvørjum einstøkum føri verða góðkent av byggivaldinum, soleiðis at farið verður eftir, hvør vinnan er, tali á starvsfólki og tørvi hjá viðskifta fólki at seta bilar frá sær og tílíkt.<br>Tó skal í minsta lagi vera eitt parkeringspláss fyri hvørjar 50 m2 av hæddarvíddini í húsunum.<br>Parkeringsplássini skulu verða gjørdir, samstundis sum bygt verður.<br>Um so er at gjøllari reglur eru ásettar í skipan, gjørd av kommununi, kunnu frávik loyvast. | *11stk. parkeringspláss verða bygd samstundis til bygningin, har av eitt er avsett til rørslutarnað.* |

**Niðurstøða hjá TD:**

- Tekniska deild er av tí fatan, at loyvt er at byggja næmingabústaðir á matr.nr 622a, samb. byggisamtyktini galdandi fyri Vágs Kommunu, ið var samtykt á býráðsfundi hin 25.04.2016.
- TD mælir sostatt til, at Tekniska nevnd loyvir Bústaðir, Yvri við Strond 6, Tórshavn at byggja ítróttarháskúla/næmingabústaði á matr. nr. 622a í Vági, samb. byggisamtyktirnar galdandi fyri Vágs Kommunu, ið vóru samtykt á býráðsfundi hin 25.04.2016, og at bygt verður samb. føroyska bygningsreglugerðina 2017, FBR17.
- Átaksleiðarin (Gudmund Jacobsen) hevur á fundi á Kommunuskrivstovuni 14.02.2018 viðgjørt ætlanina, og hevur hesar viðmerkingar og tilmælir.
  - 1. Uppsett skal vera sjálvvirkandi bruna yvirvakingarskipan ABA, ið fráboðaðar myndugleikarnar við menning av royki og hita í bygninginum.
    - TD, Bygningur hoyrir undir ”anvendelses kategori 5” og skal tískil hava ”ABA-anlæg”, hettar er eisini í trá við BK17. Sí. (5.4 Brunatøkniligar innleggingar og hondsløkkiútgerð, Stk. 15, Pkt. 3.)

- TD ger tó vart við, at formliga byggiloyvið ikki kann gevast fyrr enn eigarin av matr. nr. 622a er Bústaðir, Yvri við Strond 6, Tórshavn.

**Til støðutakan hjá TN:**

- At loyva Bústaðir, Yvri við Strond 6, Tórshavn at byggja nemingabústaðir á matr. nr. 622a, samb. innsendu tekningar og upplýsingar.
- At loyva frávik til byggisamtyktina til bygging av nemingabústaði á matr. nr. 622a liggjandi í bústaðarøki B1, bústaðarøki.
  - Hæddin upp til yvirgrind- verður 6.125 metur, og samlaða hæddin á bygninginum verður ikki hægri enn 8.5 metur.
- At taka støðu til um grannahoyring/ grannakunning ynskist.
  - TD vil gera vart við, at lýsing var í Sosialinum januar 2016, um broytingar í byggisamtyktinum fyri Vágs kommunu, við m.a. ásetingar fyri matr. nr 622a.
  - TD/FM vil vísa á, at grannahoyring vanliga ikki er neyðug, um bygt verður innanfyri treytirnar í lóggávu og byggisamtykt. TD metur at í hesum málinum er bert talan um minni frávik, jbr. kap.1, § 9 í Almennu byggisamtyktini, sum ikki geva granna rætt til partsstøðu og harvið rætti til granna hoyring.
  - Samanumtikið metir tekniska deild ikki, at bygging nærri granna enn 2,5 m í øki B (Bústaðarøkið) er at meta sum frávik, og tí metir TD heldur ikki, at tað er rætt at geva granna partsstøðu við rætti til grannahoyring. Kommunan hevur einans praktiserað grannahoyring í sambandi við bygging nærri enn 2,5 m frá grannamarki í sethúsaøki. Hetta orsakað av, at tá komi verður nærri enn 2,5 m frá marki í sethúsaøki (Øki B í byggisamtyktini), metir kommunan, at gingið verður borgaranum so nær, at hann eigur at gerast partur og partshoyrast. Tá er talan um eina grannahoyring, men ikki eitt loyvi, ið grannin skal geva.
    - TD mælir tó til, at almenn kunning verður um ætlanina.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin 06. marts 2018:**
Einmælt samtykt at geva Bústaðir principielt byggiloyvi at byggja nemingaheim sambært innsendum tekningum. Einmælt samtykt at loyva frávik frá byggisamtyktini sambært tilmæli frá TD. TN tekur undir við, at Bústaðir kunnar um ætlanina á almennum fundi.

**Vágs Býráð 19. marts 2018:**
Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku- og umhvørvisnevndini.

## 13/18 Leigusáttmáli millum Vágs kommunu og Suðuroyar Heimavirki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.01.2018 | 3/18 | 18/00026-3 |
| 2 Vágs Býráð | 19.03.2018 | 13/18 | 18/00026-3 |

Galdandi sáttmáli millum Vágs kommunu og Suðuroyar Heimavirki um atgongd til kjallara gongur út í juni 2018.
Vágs Matmøðrafelag hevur vent sær til kommununa við áheitan um at endurnýggja sáttmálan.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2018:**
Arbeitt verður víðari við málinum. Ynskið er framhaldandi at hava hendan møguleikan, men undir skipaðum viðurskiftum.

**Vágs Býráð 19. marts 2018:**
Býráðið er kunnað um málið. Uppskot verður gjørt til nýggjan leigusáttmála sum verður lagdur fyri býrðáðið.

## 14/18 Menning í Suðuroy, Smáttur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 19.03.2018 | 14/18 | 18/00093-2 |

Avtalað var á felags fundi um Menning í Suðuroy 8. mars 2018 at venda sær til kommunustýrini í Oynni og biða tey taka støðu til ætlanina viðv. at byggja smáttur til ferðavinnuna m.a.

- Um tey vilja verða við í ætlanini
- Og um so er vísa á hóskandi økir til at byggja smátturnar á

**Vágs Býráð 19. marts 2018:**
Býráðslimir eftirlýstu at man kanska hevur hagtøl fyri gistingar og ferðafólk í Oynni.
Býráðið samtykti einmælt at taka undir við at arbeiða víðari við hesum.

## 15/18 Sundurbýti av 596a - øki undir Marghøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 19.03.2018 | 15/18 | 18/00079-1 |

Fyri bygningar, ið standa á einum øki meira enn 10 ár, har annar enn eigari hevur brúksrættin yvir økinum, skullu hava egið matrikulnummar.

Sambært løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m. sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 25. mai 2009

***§ 15.*** *Í matrikuleraðum umráði kann samlaður fastur eigindómur ikki býtast sundur, og partur av slíkum eigindómi ella ómatrikuleraðum luti kann ikki avhendast ella pantsetast fyri seg ella verða latin øðrum til brúks longur enn 10 ár, uttan so at matrikulmyndugleikin góðkennir sundurbýtið, so hesin partur verður frábýttur við egnum matr. nr.*

Harafturat hevur lánveitarin hjá Vágs Ítróttarráð ta treyt, at økið, ið bygningurin er bygdur á , skal hava egnan matrikul, fyri at tryggja teirra veðrætt á hesum avmarkaða økið.

Tískil skal støða takast til at loyva sundurbýti av øki á 75mx50m, ið verður frámatrikulera frá 596a.

Eisini skal takast støðu til hvør skal gjalda fyri sundurbýti. Skal kommunan, sum er eigari av økinum gjalda fyri sundurbýti, ella skal Sjálvsognarstovnurin Vágs Ítróttarráð, ið er brúkari av økinum, gjalda?

Dánjal Bjarkhamar og Eyðbritt Krosslá limir í Teknisku- og umhvørvisnevndini hjá Vágs kommunu hava umvegis teldupost 15. mars 2018 samtykt, at taka undir við at sundurbýtið av matr. nr. 596 á (øki undir Marghøllini) verður fram og at Vágs kommuna ber kostnaðin av sundurbýtinum. Levi Mørk tekur undir við sundurbýtinum, men ivast í um tað er ein kommunal uppgáva at gjalda fyri sundurbýtið.

**Vágs Býráð 19. marts 2018:**
Samtykt við 7 atkvøðum fyri at taka undir við sundurbýtinum, og at Vágs kommuna ber kostnaðin av hesum. Jens Sivar og Meinhard Edmund atkvøddi blant.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Kirstin Strøm Bech |
| Levi Mørk | Anna Brattaberg Samuelsen | Eyðbritt Krosslá |
| Dánjal Bjarkhamar | ~~Conrad Gaard Joensen~~<br>Meinhard Edmund Vestureið | ~~Erhard Joensen~~<br>Jens Sivar Djurhuus |